Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

# EIN MIKUDAG

Mikudagin í farnu viku vitjaði bygdaredaksjónin hjá Sosialinum í Runavík. Í góðveðrinum henda dagin var nógv virksemi uttandura og innandura, eins og myndamaður okkara vísir við hesum myndum sínum. So er bert eftir at vóna, at sama veðrið verður um vikuskiftið.




## MATSTOVA

*Pêche er ein av matstøðunum í Saltangará, sum lat upp fyri júst einum ári síðani. Kokkur í matstovuni, sum pápi hansara eigur, er Egi Othard Danielsen av Strondum. Hóast húsið var fult av svongum fólkum, gav hann sær kortini stundir at leypa uttandura til eina myndatøku.*



## SKOT

*NSÍ er eitt at virknu fótbóltsfeløgunum í landinum. Her hevur ein eisini skilt, hvussu týdningarmikið tað er, at tey ungu og børnini verða sett við. Hesi ungi drongurin roynir seg við einum skoti, og man hann ikki hava fingið bóltin í málið?*



## STUÐLAR

*Uttan eitt gott bakland, bar neyvan til at hildið einum slíkum felagi sum NSÍ uppi. Tey vaksnu fylgja við børnunum til venjing og til dyst. Og so er hetta eisini eitt gott høvið at fáa sær eitt prát í góðveðrinum, meðan børnini venja á vøllinum.*



## GONG

*Tað var ik
høvdu gin
- Runavík.
Í dag var e*